Russarafiskur:

# Bjørn Kalsø ætlar ikki at leingja loyvini



*- Ætlanin er ikki at leingja undantaksloyvini at heilfrysta smáan upsa umborð á russiskum skipum, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**– Vit hava gjørt teimum, sum hava fingið loyvini at frysta heilan upsa til Ruslands, rímiliga greitt, at tá ið hesin mánaðin er úti, detta loyvini burtur, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum**

RUSSARAFISKUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

– Grundgevingin fyri at geva feløgum loyvi at senda heilan upsa, sum hevur á føroyskari uppboðssølu, óvirkaðan av landinum, var, at trýstið á marknaðinum er størst um várið, tí skipini fáa so nógvan – og smáan – upsa. Tað ráddi um at finna eina loysn við hesum fiskinum, og tí vórðu nøkur undantaksloyvi givin. Nú vártíðin er farin at halla, og minni er at fáa, er trýstið á fiskavirkini ikki so stórt. Tí ætlar landsstýrið ikki at leingja hesi loyvi – undir verandi skipan.

Hetta sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í fiskivinnumálum.

## Øll úti í senn

Vit spurdu eisini landsstýrismannin, um tað er rætt, at hann hevur givið loyvi til at leingja okkurt av nevndu loyvum til keyp av óvirkaðum upsa, eitt nú loyvi hjá Jóhan Dahl í Vági, sum onkur hevur skilt hevur fingið sítt loyvi framlongt.

– Nei, eg veit einki um, at nakað loyvi beinleiðis er longt, men vit hava latið øll feløgini, sum heilfrysta óvirkaðan smáan upsa, skilt, at tá ið hesin mánaðin er úti, detta loyvini burtur, sigur Bjørn Kalsø.

## Slakari fiskiskapur

Landsstýrismaðurin vísir á, at tá ið hesi feløg fingu síni undantaksloyvi, varð sagt, hvussu nógvar vikur tey vóru galdandi.

– Síðan komu páskirnar ímillum, og tí hava vit latið hesi feløg rímiliga greitt fingið at vita, at tá ið apríl mánaði er liðugur, detta øll loyvini burtur. Sostatt verður einki av givnu loyvunum galdandi eftir 1. mai, sigur Bjørn Kalsø, sum ikki heldur tað vera rætt at halda fram við verandi skipan, nú upsafiskiskapurin er slakari, og minni trýst er á fiskavirkini.

# Tað gongur misjavnt við garnaveiðini

**- Jú, hetta hava verið buldrasligir dagar, men soleiðis er tað nú einaferð, tá ið tú søkir sjógvin. Onkran dagin er tað sum á tjørnini – og onkran annan er harðveður, sigur skiparin á Thor, Súni Clementsen**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Garnaskipið, Thor, kom aftur av túri síðstu nátt. Teir hava verið úti í eina góða viku, men hendan túrin vignaðist fiskiskapurin einki serligt.

Sosialurin var á bryggjuni, tá ið teir løgdu at á Toftum eftir at hava verið í Havn og sett nakrar av manningini av.

Thor landaði á Toftum í gjár, og teir mettu seg at hava eini 16.000-18.000 pund av svartkalva.



*Súni Clementsen, skipari, stendur í brúgvarútinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

## Smáligt

Húsvíkingurin, Súni Clementsen, hevur verið skipari hendan túrin, og hann letur illa at veðri og fiskiskapi.

Men hóast vánaliga veðrið fleiri fylgjandi dagar herfyri, kundi manningin umborð á Thor, sum hevur gørnini standandi á Munkagrunninum, kortini draga flestu dagar.

- Vit høvdu einar tveir dagar, har vit lógu bakk, tí ikki var dragandi, sigur Súni og heldur fyri, at smáligt hevur verið við fiskiskapi allan hendan túrin.

Og tó; tað byrjaði væl, tí ein av fyrstu døgunum á túrinum fingu teir væl av fiski í gørnini.

- Men fiskiskapurin helt sær tíverri ikki, sigur skiparin.

## Skiftandi

Thor var úti í illveðinum, tá ið Vesturleiki fekk ringa sjógvin eystanfyri herfyri.

- Jú, hetta hava verið buldrasligir dagar, men soleiðis er tað nú einaferð, tá ið tú søkir sjógvin. Onkran dagin er tað sum á tjørnini – og onkran annan er harðveður.

Súni Clementsen sigur, at teir báðir túrarnir undan hesum royndust hampiliga væl. Annan túrin seldu teir í Skotlandi, hin í Føroyum. Í báðum førum fingu teir góðan prís fyri svartkalvan.

Ætlandi fór garnaskipið, Thor, útaftur í gjár.



*Aftur ein túrur er av. Hesin eydnaðist ikki so væl sum teir báðir undanfarnu*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*